# Renn og uppliv býin

Felagið "Running Copenhagen" hevur sum mál at skipa fyri rennitúrum fyri ferðafólkum og forrætninsfólkum í danska høvuðsstaðnum.



Vanliga uppliva tey ferðandi mest, meðan tey eru til gongu á einum staði. Men nú er eitt nýtt tilboð komið fram: At uppliva Keypmannahavn í renniskógvum.

– Vit hava valt at samantvinna mosjón, sightseeing og lokalan kunnleika, sigur 32 ára gamla Lena Andersson, stjóri í Running Copenhagen.

Endamálið er at rennararnir skulu fáa eina øðrvísi fatan av býnum, hitta fólk á gøtuni og ikki bert síggja tey siðbundnu støðini sum t.d. Tivoli, Lítlu Havfrúnna og Nyhavnina.

– Tær bestu upplivingarnar í einum býi fær ein, tá ein hittir tey lokalu. Og tá ferðaleiðarar okkara sjálvir eru úr Keypmannahavn og haraftrat royndir rennarar, er hetta ein vissa fyri, at fólk fáa nakað burturúr, sigur Lena Andersson við politiken.dk.

## Øðrvísi uppliving

Hugskotið til renni-konseptið fekk Lena ein morgunin, hon rann í eystturríkska høvuðsstaðnum Wien saman við einum staðkendum – og fekk eina heilt øðrvísi uppliving.

Sjálv hevur hon vitjað nógvar stórbýir, og runnið sær ein túr, uttan at nærkast teimum lokalu nakað serligt.

– Eg vóni eisini at kunna skipa fyri rennitúrum, sum ein part av tiltøkum í fyritøkum. Sjálv hevði eg fegin viljað verið við til hetta, tá eg havi ferðast uttanlands, greiðir Lena Andersson frá. Á rennitúrinum tekur hon myndir av luttakarunum, sum teir síðani kunnu heinta á heimasíðu hennara.

Running Copenhagen hevur í løtuni tveir fastar túrar um vikuna, umframt tilboð um eventrenning í samband við ávís tiltøk í Keypmannahavn. Allir túrarnir byrja við standmyndina av H.C. Andersen og enda á Ráðhúsplássinum.

## Tveir túrar

Running Copenhagen skipar fyribils fyri tveimum føstum túrum.

Annar teirra er City Tour, sum er fríggjadag og leygardag kl. 10, er 8 km. langur og tekur 90 minuttir. Hann gongur – ella rennur – framvið Fólkatinginum, Amalienborg og Lítlu Havfrúnni.

Hin túrurin Business Tour er týsdag og hósdag kl. 7 og tekur ein tíma. Hann gevur forrætningsfólkinum ein møguleika at uppliva annað enn flogvøllir, hýruvognar og rennibondini á heilsurúminum á hotellunum.

